# Ein góður dagur í



*Í dag hava øll bil. Og tí kundu fólk saktans búð her norðuri í Múla og arbeitt aðrastaðni*

*– Eg skilji ikki, hví fólk ikki kunnu búgva her og arbeiða aðrastaðni, sigur múlamaðurin, Eilef Frederiksen*
*Mynd: Høgni Thomsen*

**Einaferð var nógv lív í Múla, men soleiðis er ikki longur. Tey vitjandi kunnu vera heppin at hitta kríatúr og fenað.**

**- Nei, her er lítið lív í longur, sigur múlamaðurin, Eilef Frederiksen, sum nú er búsitandi í Norðdepli**




BYGDAMENNING

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Múli:** Tað er ikki ein sál at síggja í bygdini henda vakra mikudagin í farna mánaði.

Mánaðurin er 20 dagar gamal og bert ein dagur vantar í longsta dag. Tað er hásummar, men kortini heldur grátt á himli. Men einki bendir á at nakrir dropar skulu koma hesa løtuna.

Klokkan er farin at nærkast tvey og einastu tekin um at nakað livandi er í bygdini beint nú, er ein persónbilur. Hesin bilurin stendur í roynd og veru á einum rættiligum parkeringsplássi á Múlavegi í hesi lítlu og fjarskotnu bygdini.

Einki bendir á nakað livandi. Tað einasta livandi í so máta er tutlið úr hugnaligu ánni, sum rennur gjøgnum hesa eftir øllum at døma manntómu bygdina.

Brádliga verður friðurin avbrotin av hamarsløgum. Man onkur vera farin at byggja sær nýggj hús her?

Nei, so er ikki. Her eru menn farnir undir at umvæla og klæða eini av teimum norðaru sethúsunum.

- Nei, vit bara arbeiða her. Far tær longur norður í bygdina – rættiliga langt norður, har er fólk at síggja, sigur ein teirra.

## Rabarburnar

Hetta er tíðin, tá fólk er í ferð við uttandura virksemi. Hjá teimum sum dáma tað er helst líkamikið um, hvar tað er.

Henda mikudagin var 73 ára gamli Eilef Frederiksen farin norður í føðibygd sína at taka rabarbur upp, saman við øðrum.

Rabarbugarður hansara liggur nakað norðan fyri bygdina: Ein høgur grótgarður forðar vindinum í at gera skaða á rabarbur og røturnar, sum standa tætt saman.

Eilef er føddur og uppvaksin í hesi norðastu bygdini á Borðoynni, men býr í dag í grannabygdini fyri sunnan, Norðdepli.

- Rabarburnar hjá okkum plaga at vera góðar, slær hann fast.

## Seinasti streymurin

Í dag er Múli at kalla avtoftað, men sambært Hagstovuni eru kortini trý fólk skrásett sum heimahoyrandi her.

Sum skilst var Múli eisini seinasta bygdin í Føroyum sum varð knýtt upp í elkervið hjá SEV. Hetta hendi 19. september í 1970.

Bygdin telist millum tær elstu í Føroyum, og er í roynd og veru meiri enn 700 ára gomul. Hon er nevniliga nevnd í tí sonevnda Hundabrævinum frá 1300-talinum.

Undir ymsum líkindum og umstøðum búleikaðust fólk í bygdini, og fyri 270 árum síðani varð skúli settur á stovn í økinum, tey í dag nevna eystan Múla.

Hetta árið – í 1835 – fór ein viðingur, sum var giftur á Norðtoftum at lesa við børnunum í Norðtoftum, Depli og í Múla.

Um tað mundið tá Eilef eftir røttum skuldi fara í skúla, var kortini ein broyt-